

Tórhallur Andreassen:

# Gott samband við ættina í Íslandi

**Nú eru vit komin til næstseinasta partin av hesi søguni hjá Tórhalli, har vit hava verið rættuliga víða. Av beiggjunum umrøða vit hesa ferð Wolfang og Kaysten, og vit koma aftur inn á hendingina við Havfrúnni**



Ættarmót hjá íslendsku og føroysku ættini hjá Tórhalli



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**Partur 9**

## Wolfang var vala skipari

Wolfang var tað níggunda av teimum 14 systkjunum. Tórun hjá Wolfang hevur greitt frá onkrari hending, sum pápin fortaldi frá sínum barndómi.

Eina ferð, tað var grind, bað mamman Wolfang fara eftir torvi. Hetta hevði hann lítlan hug til. Tað var jú nógv meira spennandi at sleppa í grind. Her var tó eingin bøn, og hann mátti fara. Hann ger ikki vandari enn, at hann fyllir leypin úr fyrstu krónni, hann kemur fram á, og er tí skjótur aftur. Mamman kundi rokna út, at her var okkurt galið, so hann mátti niðan aftur at leggja torvið, har hann hevði tikið tað og síðan at fara eftir torvinum, har tey áttu tað. Tá ið hann tá kom heim aftur, var grindin deyð.

Allir beiggjarnir vóru so sera grammir eftir at sleppa á flot. Wolfang fortaldi, at teir plagdu at leggja seg at sova í bátinum fyri at vera vísir í, at teir sluppu við.

Hetta kundi vera, tá ið pápin og eldru beiggjarnir fóra at kasta nót, dyrgja og annað í Sundalagnum. Teir komu tískil eisini at fiska frá tí, teir vóru heilt smáir.

Navnið Wolfang er eitt sjáldsamt navn á okkara leiðum. Men søgan er tann, at mamman las eina bók, har høvundurin æt Wolfgang. Henni dámdi væl navnið og avgjørdi, at kalla nýfødda son sín tað sama, tó við teirri broyting, at hann fekk navnið Wolfang ístaðin fyri Wolfgang.

Wolfang fór heilt ungur til skips og var við fleiri skipum. Av teim fyrstu kunnu nevnast: William Martin, Suðuroyggin og Símun á Torkilsheyggi.

Wolfang var skipari á Havfrúnni í 1949, og var hetta fyrstu ferð, hann var skipari. Seinni førdi hann Símum á Torkilsheyggi og Varðan, sum var ein 50 tonsari hjá Poul Hansen. Síðan fór hann sum skipari við tí nýbygda Búgvanum hjá sama reiðarí í 1957.

Í 1959 gjørdist Wolfang skipari á línuskipinum Grím Kamban, sum Poul Hansen lat byggja, og tá var tað, at eg fór at føra Búgvan. Hetta var í byrjanini av línubátatíðini, tá ið tað framvegis var eitt privilegium at sleppa við línuskipi og ikki minst at gerast skipari.

## Um Grím Kamban

Grímur Kamban var bygdur á Hatløs Mekaniske Verksted í Ulsteinsvik. Hann var 116 føtur langur, 25 føtur breiður og 12 føtur djúpur. Støddin var 291tons brutto, og var kann tískil nakað størri enn systirskipini Beinir og Brestir. Hann tók 200 tons av saltfiski, meðan hinir tóku 160 t. Motorurin var ein Alpha Diesel, sum var 420 hestar.

Grímur Kamban var fyrsta skipið, sum varð bygt gjøgnum Ognarfelagið. Tað vóru Jens Christian Johannesen, stjóri á Fiskasøluni, Johan Dahl, reiðari í Vági, og Leif Waagstein, sakførari, sum fingu hugskotið at stovna hetta felag. Endamálið var at standa fyri bygging av nýggjum skipum. Hetta var eisini gjørt fyri at lætta um kravið til eginpening. Hetta krav var 10%, og gjørdi tað trupult hjá monnum at lata skip byggja í eini tíð, tá ið eginpeningurin skuldi leggjast á borðið.



Ingolvur tv og Wolfang við bjargingarstólinum, sum bjargaði teimum í land av Havfrúnni í 1949